# Landsliðið ætlar at vinna

**HONDBÓLTUR** – Fyri fýra árum síðani vunnu vit greitt á bæði Írlandi og Skotlandi, og tað ætla vit eisini at gera hesa ferð, sigur annar av venjarunum, Dia Midjord, nú manslandsliðið í hondbólti um vikuskiftið spælir við í trílandakapping í Dublin

Hilmar Jan Hansen




*Landsliðsvenjararnir báðir, Kári Nielsen og Dia Midjord, fara um vikuskiftið við manslandsliðnum til Dublin fyri at vinna teir báðar dystirnar ímóti Skotlandi í kvøld og Írlandi í annaðkvøld*

*Savnsmynd: Hilmar Jan Hansen*

Í morgun er manslandsliðið í hondbólti farið av landinum við kós ímóti Dublin í Írlandi, har tað um vikuskiftið skal spæla tveir dystir í eini trílandakapping. Tann fyrri verður í kvøld klokkan 19 ímóti Skotlandi og tann seinni í annaðkvøld klokkan 18 ímóti Írlandi.

Føroyar vóru í oktober 2007 til Challenge Trophy-kapping í Luxembourg og møttu tá bæði Írlandi og Skotlandi. Ímóti írum gjørdist tað ein 46-21 sigur og ímóti skotum var úrslitið enn ógvusligari, tí tá vunnu Føroyar 58-19.

– Eg veit ikki, hvussu Írland og Skotland hava staðið seg síðani tá, men rokni við, at tey hava ment seg eitt sindur. Men eingin ivi er um, at vit ætla okkum at vinna báðar dystirnar greitt, sigur Dia Midjord, ið saman við Kára Nielsen tekur sær av at venja manslandsliðið.

Sjálv úrslitini eru eitt, men eisini er annað, ið hevur týdning hjá teimum báðum venjarunum í hesum báðum dystunum í Dublin.

– Vit hava mannað liðið soleiðis, at vit hava eina ketu við yngri spælarum og eina við eldri. Hetta skal síggjast í ljósinum av, at vit innan fyri eitt til tvey ár koma at siga einum ættarliði av spælarum farvæl, samstundis sum eitt nýtt ættarlið skal taka við, sigur Dia Midjord.

Báðir dystirnir á Írlandsferðini verða at síggja á heimasíðuni hjá Hondbóltssambandinum, so fólk har kunnu fylgja við, hvussu leikur fer.

# Avgerandi í Runavík

**HONDBÓLTUR** Dysturin millum Tjaldur og Stjørnuna sunnudagin verður avgerandi fyri, hvussu endaspurturin í oddastríðnum fer at síggja út, tí Tjaldur hevur ikki ráð at tapa

Hilmar Jan Hansen

Tað eru ikki so nógv skot eftir í byrsuni hjá Tjaldri, sum sunnudagin tekur ímóti Stjørnuni í ítróttarhøllini í Runavík og skal reisa seg aftur eftir stórtapið fyri Neistanum fyri viku síðani. Undan dystinum er Tjaldur tvey stig aftan fyri bæði Neistan og Stjørnuna, og tá vikuskiftið er farið aftur um bak, hevur Neistin ein dyst eftir, Stjørnan tríggjar og Tjaldur tveir.

Sostatt er sigur eitt krav hjá Tjaldri, skal liðið røkka í FM-finaluna í Sunset-kappingini triðja árið á rað. Stjørnan hevur tá eftir at spæla úti ímóti VÍF og heima ímóti StÍF, umframt úti ímóti Neistanum, ið kann gerast enn ein sera avgerandi dystur. Tjaldur skal á útivølli møta VB og at enda á heimavølli StÍF.

Neistin spælir longu í morgin á útivølli ímóti StÍF, og til tann dystin má Neistin sigast at vera favorittur, so støðan í oddanum neyvan viknar stórvegis. Triði dysturin er sunnudagin í høllini á Hálsi í Havn, har Kyndil tekur ímóti Neistanum.

Atlantic Airways-kappingin hjá monnum hevur frí um vikuskiftið, tí manslandsliðið er í Írlandi og spælir.

# Fjallasúkklur í Hoydølum

**FJALLASÚKKLING** Seinnapartin í morgin verður kapping í fjallasúkkling í Hoydølum, har bæði unglingar og vaksin kappast

Hilmar Jan Hansen

Vakra umráðið rundan um studentaskúlan í Hoydølum verður karmur um kappingina í fjallasúkkling, sum byrjar klokkan 14. Heitt verður á súkklarar, sum ætla sær at vera við, um at møta ein tíma áðrenn.

Startur og mál eru við fimleikahøllina hjá studentaskúlanum, og annars er teinurin á gøtunum yvir ímóti Boðanesi og gøtunum inni í viðarlundini.

Hetta er ein kapping, sum bæði er fyri unglingar og vaksin. Tey vaksnu súkkla 40 kilometrar og unglingarnir 20 kilometrar.

hilmarjan@sosialurin.fo




*Fróði Benjaminsen, liðformaður hjá HB, hevur síðstu tvey árini verið uppi og tikið ímóti Lions-steypinum, ið spælt verður um í stórsteypadystinum. So fæst at síggja, um EB/Streymur hesa ferð megnar at vinna steypið frá HB*

*Savnsmynd: Sofus D. Johannesen*

# Spæla um Lions-steypið

**FÓTBÓLTUR** Ársins stórsteypadystur verður sunnudagin millum føroyameistararnar í HB og steypavinnararnar í EB/Streymi, og allur ágóðin frá dystinum fer til CTD-felagið

Hilmar Jan Hansen

Seinnu árini hevur stórsteypadysturin verið fyrsta veruliga teknið um, at fótbólturin aftur er farin á rull, og so er eisini hesa ferð. Sunnudagin klokkan 16 møtast HB og EB/Streymur í dystinum, ið verður spældur til frama fyri okkurt vælgerandi átak hjá Lions Club í Føroyum.

Fyri viku síðani spældu føroyameistararnir og steypavinnararnir frá í fjør finaluna í Klaksvíkskappingini, og tá royndist EB/Streymur eitt mál betur enn HB. So fæst at síggja, um HB vinnur Lions-steypið triðja árið á rað ella um EB/Streymur skal vinna tað fyrstu ferð.

Pætur Albinus dømir dystin og hevur aftur at sær Jón Kára í Brekkuni og Pætur E. Rasmussen sum linjudómarar. Eftir dystin handa Niels Nattestad frá Lions Club og Christian Andreasen frá Fótbóltssambandinum liðunum heiðursmerki og vinnaranum steyp, og eisini fær CDT-felagið handað gávubræv upp á ágóðan av dystinum

Atgongumerkini til henda dystin hava vanligan Vodafonepris, men ikki hevur verið óvanligt hini árini, at fólk fegin rinda meira enn ásetta prísin, og tí hevur borið til at savna fitta upphædd til vælgerandi endamálið.

hilmarjan@sosialurin.fo

**Sunset Deildin** *Kvinnur*

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNIN MÁL | TAPT MÁL | MUNUR | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Neistin | 22 | 631 | 497 | 134 | 34 |
| 2 | Stjørnan | 20 | 568 | 469 | 99 | 34 |
| 3 | Tjaldur | 21 | 592 | 508 | 84 | 32 |
| 4 | VB | 21 | 532 | 526 | 6 | 22 |
| 5 | Kyndil | 22 | 506 | 550 | -44 | 14 |
| 6 | VÍF | 21 | 473 | 586 | -113 | 7 |
| 7 | StÍF | 21 | 421 | 587 | -166 | 5 |